## Mancini vil hava Viera

Fleiri feløg í Onglandi hava áhuga í at gera sáttmála við liðskiparan á franska landsliðnum, Patrick Viera, sum ikki klárar so væl upp við Inter-venjaran, José Mourinho. Sambært BBC er Manchester City fyrsta valið hjá Patrick Viera. Patrick Viera samstarvar væl við fyrrverandi Inter-venjarin, Roberto Mancini, sum nú er venjari hjá Manchester City. Patrick Viera var tann fyrsti spælarin, sum Arsenal-venjarin, Arsene Wenger gjørdi sáttmála við afturi í 1996, og spældi Viera við The Gunners fram til 2005, tá hann skrivaði undir sáttmála við Juventus. Viera spældi meir enn 400 dystir við Arsenal, har hann vann trý meistaraheiti og fýra steypakappingar. Í 2006 skrivaði Viera sáttmála við Inter. Viera hevur vunnið italska meistaraheitið við Mancini, sum venjara, bæði 2007 og í 2008.



## Drogba er slitin

Venjarin hjá Fílabeinsstrondini, Vahid Halilhodzic er óttafullur um Didier Drogba, og hann heldur, at Chelsea leggur ov nógvar byrðar á framherjan. Vahid Halilhodzic er harmur um, at Didier Drogba hevur spælt níggju dystir fyri Chelsea uppá fimm vikur. - Vit eru óttafullir um kropsstøðuna hjá øllum okkara spælarum, men vit eru serliga óttafullir um Drogba, sum altíð spælir nógvar dystir, sigur Vahid Halilhodzic við enska blaðið, Express. Tað er órealistiskt at spæla tveir dystir uppá tríggjar dagar. Ein slík leikskrá er ov krevjandi fyri ein lyklaspælara, sum Didier Drogba. - Fyri 10 døgum síðani var eg í Onglandi fyri at tosa við Didier Drogba um hetta, tí eg vildi steðga hesum. Hann er eitt menniskja, og ikki ein maskina, sigur ein harmur Vahid Halilhodzic. Fílabeinsstrondin spælir tann fyrsta dystin í innleiðandi bólkaspælinum í Africa Cup of Nations mánadagin. Dysturin er ímóti Burkina Faso.

# Søgulig svørt belti

**Millum jól og nýggjár stóðu fýra mans royndina til svarta belti í judo. Hetta var ein søguligur dagur, tí ongantíð áður hevur ein slík beltroynd verið í Føroyum**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam

28. desember 2009 gjørdist ein søguligur dagur í føroyskari judosøgu. Áki Davidsen, Hjalmar Johannesen, Jógvan Páll Kristiansen og Sam Vang stóðu allir royndina og fingu svart belti í judo.

Teir fýra eru ikki teir fyrstu føroyingarnir, sum hava staðið hesa somu roynd. Men tað var fyrsta ferðin, at ein roynd av hesum slagnum var hildin í Føroyum. Hetta var eisini fyrsta ferðin, at fýra føroyingar valdu at taka svarta belti í judo samstundis, og henda roynd varð hildin í Felagsskúlanum á Oyrarbakka.



**Teir fýra judoíðkararnir saman við venjara sínum. Frá vinstru eru teir Jógvan Páll Kristiansen, Sam Vang, Zvonko Mrdalo, Hjalmar Johannesen og Áki Davidsen**

Mynd: Sofus D. Johannesen

### 2009 eitt ótrúligt ár

Við hesi roynd staðfestu teir fýra, at 2009 av sonnum hevur verið eitt ótrúliga gott ár fyri judo í Føroyum. Teir prógvaðu eisini, at góðu úrslitini frá oyggjaleikunum í summar, har Jógvan Páll Kristiansen vann gull, Hjalmar Johannesen vann silvur og Áki Davidsen og Sam Vang vunnu bronsu, ikki komu av ongum.

Fram til kappingarnar á Álandi vandu teir fleiri ferðir um vikuna, viðhvørt tvær ferðir um dagin. Eftir ein lítlan summarsteðg funnu teir judodraktina – sokallaðu gi'ina – fram aftur, og hava vant eins miðvíst og undan oyggjaleikunum.

Málið var greitt. Áðrenn 2009 var av, skuldu teir fýra hava knýtt svarta beltið um búkin. Tríggjar dagar fyri árskiftið komu allir á mál – samstundis.

### Frá næmingi til meistara

Tað krevst ikki stórt innlit í judo fyri at vita, at svarta beltið hevur tygn. Í judohøpi verður eisini skilt í millum svarta belti og so tey, ið koma áðrenn.

Í stuttum ber til at siga, at svarta belti skilir næming og meistara. Hvítt, gult, appilsinlitt, grønt, blátt og brúnt belti er alt næmingastig. Svarta beltið er meistarastig og áðrenn 28. desember 2009 vóru tað einans tríggir føroyingar, ið høvdu svarta belti. Hesir vóru Luis Balsa, Ingi á Tórgarði og Búgvi Poulsen. Luis Balsa tók svarta belti í Spania, meðan hinir báðir vóru til somu beltroynd í Danmark.

Tað vóru eisini Ingi á Tórgarði og Búgvi Poulsen, sum saman við Zvonko Mrdalo, venjara í Sunda Judofelag, ið vóru dómarar til beltroyndina hjá teimum fýra. Eisini Zvonko Mrdalo, sum kemur úr Pólandi, hevur svart belti í judo.

Innan fyri svarta belti eru tíggju stig. Tá tú tekur svarta belti av fyrstan tíð, hevur tú tað, tey rópa 1. Dan. Næsta stigi er 2. Dan og so gongur tað annars upp til 10. Dan.

Eingin føroyingur hevur meira enn 1. Dan, og fyri at ein beltroynd til svarta belti kann haldast, krevst, at minst ein av dómarunum hevur eitt Dan hægri enn tað, ið givið verður.

Zvonko Mrdalo hevur 2. Dan. Og við honum í dómarabólkinum bar til at halda beltroyndina í Føroyum. Við øðrum orðum hevur tað áður ikki verið møguligt at hildið eina líknandi roynd í Føroyum. Partvíst tí, at judoíðkararnir ikki hava vant fram í móti hesum, og partvíst tí, at tað ikki hevur latið seg gjørt reint praktiskt.

### Ambitiøsir mans

Teir tríggir dómararnir høvdu so at siga einans rósandi orð at bera judoíðkarunum í samband við beltroyndina, og Búgvi Poulsen, landsliðsvenjari, hevði á orði hvussu ambitiøsir teir fýra vóru. Hetta grundaði hann millum annað á tað, sum judoíðkararnir sýndu fram undir royndini.

Mest nýtta mannagongdin til royndina at fáa svarta belti er, at íðkararnir sýna fram eina seriu av judoteknikkum, sum er býtt sundur í tríggjar partar. Hetta gjørdu teir fýra í høllini á Oyrarbakka eisini. Men umframt tað, tóku teir eisini tveir partar aftrat seriuni. Hesir báðir síðstu partarnir eru júst teir somu, sum tá tú tekur næsta stigi í beltøku, eftir tú hevur fingið svarta belti – sonevnda 2. Dan.

Hetta vil siga, at teir fýra judoíðkararnir í roynd og veru sýndu fram alla seriuna til 2. Dan, sum er rættiliga óvanligt í samband við beltroynd til 1. Dan.

– Tað prógvar bara, at tit allir eru klárir at fara víðari, segði Búgvi Poulsen, landsliðsvenjari.

Ikki tí, Búgvi Poulsen segði eins og Ingi á Tórgarði og Zvonko Mrdalo, at serian ikki var lýtaleys hjá nøkrum teirra. So Áki Davidsen, Hjalmar Johannesen, Sam Vang og Jógvan Páll Kristiansen hava fleiri ting at arbeiða við komandi tíðina, um teir ynskja at taka næsta stigi innan fyri belttøku og harvið skriva enn ein søguligan kapittul í føroyskari judosøgu, nevniliga at vera fyrstu føroyingarnir við 2. Dan.

### Fyrimyndir fyri restina

Eisini formaðurin í Judosambandi Føroya, Sofus D. Johannesen, var til staðar undir beltroyndini. Hann gjørdi greitt hvønn týdning tað hevði, at Føroyar nú eiga fýra judoíðkarar aftrat, ið hava tikið svarta belti.

– Vit hava ikki altíð raðfest beltroyndir so høgt og tað er spell. Ikki tí, tit hava eisini áður prógva, at tit saktans kunnu skapa góð úrslit uttan svarta belti. Men við tykkum fýra hava tey yngru fingið nakrar fyrimyndir, sum hava prógvað, at tað loysir seg at venja miðvíst, bæði móti kappingum og beltroyndum, segði Sofus D. Johannesen, formaður í Judosambandi Føroya.